**Munnligur fyrispurningur til
Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í almannamálum
um hækking av pensjónsaldri og broyttari mótrokning í fólkapensjónini**

1. Ætlar landsstýriskvinnan at hækka pensjónsaldurin? Um ja, nær og hvussu nógv?
2. Fer landsstýriskvinnan at leggja lóg um broyting í fólkapensjón, herundir broyting í mótrokning í fólkapensjón, fyri Løgtingið?
3. Um ja, nær, og hvørjar broytingar kunnu í høvuðsheitum væntast?
4. Fer landsstýriskvinnan at fremja broytingar, ið koma at ávirka Samhaldsfasta (AMEG) ?
5. Um ja, nær, og hvørjar broytingar kunnu í høvuðsheitum væntast?
6. Nær fáa føroyingar fult innlit í, hvat hendir við útgjaldi av tí pensjón, ið verður lógarkrav at rinda inn til pr. 1. januar 2014?

**Viðmerkingar**
Landstýriskvinnan í almannamálum hevur fleiri ferðir fráboðað, at ætlanin er at hækka pensjónsaldurin. Í sambandi við, at landsstýrið legði fram fíggjarkarmar fyri 2013 og komandi árini, fráboðaði landsstýriskvinnan at pensjónsaldurin fór at hækka úr 67 upp í 68 ár lonu 1. januar 2013, og upp í 69 ár, longu í 2016. Tvs. ein hækking av pensjónsaldrinum á 2 ár uppá 3 ár. Henda ætlan varð fyribils slept seinni, men hevur landsstýriskvinnan nú aftur fráboðað at pensjónsaldurin skal hækkast. Enn er tó onki ítøkiligt boð komið uppá hetta.
Eisini hevur landsstýrið fráboðað – hetta í sambandi við, at Eftirlønarlógin (lógartvungið inngjald) varð løgd fyri Løgtingið í vár – at lóg um fólkapensjón, herundir mótrokning av egin uppsparing í fólkapensjónini – fór at verða løgd fyri á Løgtingi í heyst. Enn hava vit onki sæð til hesa lóg. Hetta merkir, at meðan fólk verða tvungin at rinda inn til egna pensjón pr. 1. januar 2014, so vit føroyingar enn ikki, hvat landsstýrið ætlar at nýta hesa egin uppsparing til, tá umræður mótrokning í fólkapensjón v.m. Heldur ikki er greitt, hvat landsstýrið ætlar við Samhaldsfasta. Hetta skapar sera stóran ótryggleika um pensjónsøkið.
Fyri at fáa lýst málið, verða hesi spurningar settir landsstýriskvinnuni.

Á Løgtingi, 26. november 2013

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi